## Avloysarastarv sum

# arkitektur, verkfrøðingur ella byggifrøðingur

## á Teknisku Umsiting hjá Klaksvíkar Kommunu

**Ein av byggifrøðingunum á Teknisku Umsiting hjá Klaksvíkar Kommunu fer í farloyvi frá 1. januar til 31. desember 2006. Tí er eitt tíðaravmarkað starv, nevnda tíðarskeið, hervið leyst at søkja.**

**Høvuðsuppgávurnar verða:**
Byggimálsviðgerð, býarplansarbeiði, eftirlit, planlegging, projektering av kommunalum arbeiðum og aðrar málsviðgerðir eins og dagligar uppgávur hjá umsitingini.

**Persónligir førleikar og eginleikar:**
Vit sóknast eftir útbúnum arkitekti, byggifrøðingi, verkfrøðingi ella persóni við aðrari viðkomandi útbúgving.
Dentur verður lagdur á, at umsøkjararnir duga væl at leggja arbeiðið til rættis, eru fyrikomandi og hava munnligan og skrivligan málførleika. Royndir á nevndu økjum kunnu geva fyrimun

**Starvið verður sett skjótast tilber, og lønin verður sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.**

**Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til býarverkfrøðingin ella býráðsskrivaran á tlf. 410000.**

Umsóknir, saman við prógvið, møguligum viðmælum v.m., verða at senda til:

**Klaksvíkar býráð**
Postsmoga 2
700 Klaksvík

**og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 16. januar 2006.**

# Almennir fundir

## hjá Nes kommunu í 2006

Fundirnir eru kl. 19.00 í fundarhølinum hesar dagar:

| | |
|---|---|
| Mánadagin 30. januar | Mánadagin 26. juni |
| Mánadagin 27. februar | Mánadagin 4. september |
| Mánadagin 27. mars | Mánadagin 2. oktober |
| Mánadagin 1. mai | Mánadagin 6. november |
| Mánadagin 29. mai | Mánadagin 4. desember |

**Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu vera kommununi í hendi 14 dagar áðrenn fundin.**

Fíggjarætlanin fyri 2006 liggur frammi á kommunu-skrivstovuni í døgunum frá 10. til 24. januar 2006.

**Nes kommuna**

Tekniski Skúlin Klaksvík

# Lærari í enskum

til yrkisútbúgving í El- og Maskinfakinum verður søkt eftir einum undirvísara við førleika í enskum á E-stigi at byrja 23. januar 2006.

**Tímarnir eru hesir:**
- elektrikkarar, 8 tímar/viku, 30. januar til 7. apríl 2006
- maskinsmiðir, 4 tímar/viku, 30. januar til 7. apríl 2006
- maskinsmiðir, 4 tímar/viku, 23. januar til 7. apríl 2006.

Setanartreytir eru eftir sáttmála í millum FTL og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast skúlanum innan 13. januar.

Eru spurningar, so kunnu áhugað venda sær til Rúna Heinesen, skúlastjóra.

**Tekniski Skúlin í Klaksvík**
Postboks 20 · 700 Klaksvík
www.tsk.fo

# Hygg her !



**Hava tygum eitt grundstykki tygum vilja hava gjørt byggibúgvið ella hampan av lendi rundan um húsini v.m. vilja vit fegnir geva tygum eitt tilboð uppá hetta. Arbeiðið verður gjørt skjótt og gott fyri tann rætta prísin.**

**SP/F TK-BORÐING**
**v/Jón Kári Højgaard · tel 44 84 52 ella tel 22 59 21**

**Almannamálaráðið**

# Almanna- og heilsumálaráðið leitar eftir løgfrøðingum

Nærri fæst at vita um hetta við at fara inn á heimasíðu okkara www.ahr.fo

Umsóknarfreistin er 12. januar 2006 kl. 12.00.



## Sethús á Argjum til sølu

Húsini eri í 3 hæddum á 137 kvm. Grundøkið 667 kvm.
Lofthæddin. 2 kømur, the-køkur, wc, stór stova, gongd og altan.
Miðhæddin. 3 kømur, køkur, stór stova, wc/baðirúm, gongd og hjallur.
Kjallarahædd. Kamar, køkur, stova, wc/baðirúm, sauna, gongd, umframt fýr/vaskirúm og bilgarasja.

Verður selt um nøktandi boð verður givið.

**Telefon 31 49 28 ella 26 49 28**

Sosialurin

Spf. **GRAVSTEINAR**




*Opið: mánadag - fríggjadag $9^{00}$-$17^{00}$*
*annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74

## Toyota LandCruiser til sølu



Árg. 1997
Koyrt uml. 157.000 km
Skrásettur sum bussur
9 sitipláss + førara
Stóra koyrikortið krevst

**Boð undir kr. 160.000,-** *ongan áhuga*

**Tel. 210111 / 210298 / +45 30618494**

**veitst tú ikki tað?**